Góðu fíggjarnevndarlimir,

Veltan takkar fyri høvið at koma til hoyring í løgtingsmáli 19/2025 um MVG frítøku av millum annað eplum og grønmeti.

Her er ein lítil heilsan frá okkum – eitt sindur av grønmeti, vit hava tikið upp úr jørðini á Sandi í morgun.

Hetta er úrslitið av hørðum arbeiði. Hetta er eisini eitt úrslit av, at politiska skipanin og myndugleikarnir seinastu árini hava sent eitt greitt signal um, at mann ynskir meira føroyskt grønmeti. Átøkini hjá m.a. Búnaðarstovuni á Sandi serliga seinastu tvey árini tala fyri seg. Nú selja handlarnir á Sandi føroysk jarðber, salat, leyk, kál, epli og mangt annað, sum veksur í jørðini, tí tit hava sett pengar av til tað.

Tó vilja vit eisini koma við eini ávaring. Í morgin fer eitt uppskot til hoyring um at farleiðina til Suðuroynna. Vit gleða okkum til ein Suðuroyartunnil – eingin ivi um tað. Men vit ynskja staðiliga at heita á tykkum um at umhugsa farleiðina, tit hava valt at fara víðari við.

Farleið 1A fer tvørtur gjøgnum miðdepilin fyri alla føroyska grønmetisframleiðslu – hon oyðileggur alt tað, vit í felag hava bygt upp seinastu árini.

Við vón um, at tit umhugsa tykkara støðu,

Veltan